# Palli gestur á árligu Vrå-framsýningini



TÍÐINDASKRIV

Størsta listaframsýningin í Danmark uttan fyri Keypmannahavn er tann árliga Vrå-framsýningin, sum í ár letur upp nú sunnudagin 27. juli. Tað eru fólk við tilknýti til sonevnda Listabygningin í Vrå, sum skipa fyri og eru við á framsýningunum. Í ár hava tey m.o. boðið J.P. Gregoriussen arkitekti at vera við á framsýningini, sum er opin til 24. august. Á framsýningini vísir Palli byggilist, skrásetingar av føroyskum kirkjubygningum og tekningar úr Havnini. Hann hevur fingið tillutað 9 metrar av framsýningarveggi í Kunstbygningen.

Kunstbygningen er felags framsýningarhøli hjá teimum gott og væl fjøruti limunum. Teirra millum teljast fólk, ið m.a. eru kend fyri listarligu avrik síni, eitt nú listamálarin Svend Engelund, arkitektarnir Inger og Johannes Exner, sum m.a. eru kend frá endurbyggingini av Koldinghus, John Olsen, Erik Heide, Jette Vohlert, Peter Hentze, Bent Exner og Poul Winther, bert fyri at nevna nøkur teirra.

Gestaframsýnararnir í ár eru seks í tali. Umframt Palla Gregoriussen eru Karin Birgitte Lund, Lars Pedersen, Poul Schöbel, Torben Schønherr og Anna Brix Studsholt.

Kunstbygningen liggur í Vrå í Norðurjútlandi og virkar sum framsýningarhøli hjá teimum mongu, ið hava sýnt fram listaverk á Vrå-framsýningunum. Í ár eru 60 ár síðan Svend Engelund tók stig til Vrå-framsýningina, sum hevur verið hildin í listahølunum hjá háskúlanum í Vrå á hvørjum ári síðan. Sjálvur bygningurin er bygdur í 1992. Vanliga verða einar fimm framsýningar hildnar um árið, og tær fevna um umsar greinir innan myndlistina; málningalist, standmyndir, listahandverk og arkitektur, fotolist og grafikk. Í løtuni verður arbeitt við at víðka Kunstbygningen, sum er 320 fermetrar, til 800 fermetrar.




Avleiðingar av váta veðrinum:

# Svartspilla í eplunum

**P/F Jógvan Weihe hevur fingið pulvur úr Danmark at loysa trupulleikan við svartspillu í eplunum**

EPLIR
*Heini í Skorini*

Meðan sólin hevur skinið oman og niðan á summum plássum í Føroyum, hevur talan í stórum pørtum av landinum verið um sera váttligt veður, ikki minst í høvuðsstaðnum.

Hetta hevur nú fingið keðiligar avleiðingar fyri eplini, tí í fleiri eplaveltum eru eplini rakt av svartspillu. Partafelagið Jógvan Weihe, sum í fleiri ár hevur selt epli, hevur nú roynt at loyst trupulleikan við innfluttari vøru úr Danmark.

## Pulvur er loysnin

Eftir at hava fingið fleiri fyrispurningar um, hvussu trupulleikin við svartspillu skal loysast, hevur Jógvan Weihe vent sær til Danmarkar, og fríggjadagin 25. juli kemur eitt slag av pulvuri (Dithane) til Føroya.

Við at blanda pulvurið við vatni og síðani koyra tað útyvir slokkarnar, skuldi ein fingið bilbukt við trupulleikan. Við tað at talan er um ein útbreiddan trupulleika, kemur pulvurið í tøkum tíma til Partafelagið Jógvan Weihe, sum sostatt fæst til keyps.

## Selir korn móti morsniglinum

P/F Jógvan Weihe hevur eisini korn móti nógv umtalaðu landapláguni, morsniglinum. Kornið, sum verður lagt í urtagarðarnar, lammar snigilin, og er hetta eitt hent amboð í stríðnum at basa skaðiliga snigilin.



